# Uppflyting er realistiskt




## TB boðar frá, at Jón Johannesen verður eisini venjari á Tvøroyri í 2011. Uppflyting er eitt realistiskt mál, sigur Jón Johannesen

Uni Holm Johannesen

Kappingarárið 2011 verður undarligt fyri tvøráfólk.

TB fer ikki at spæla sínar heimadystir á Sevmýru. Vøllurin er so slitin, at Fótbóltssambandið vil ikki geva neyðugu góðkenningina.

Hóast karmarnir verða øðrvísi, hevur felagið brett upp ermar. Fyrireikingarnar til kappingarárið eru byrjaðar.

TB boðar frá á sínari heimasíðu, at Jón Johannesen verður eisini venjari næsta ár.

- Vit fara at arbeiða við at verða meira kyniskir í avgerandi løtunum av dystum. Vit skulu ikki søpla óneyðug stig burtur, sigur Jón Johannesen við tb.fo.

### Spennandi oyggjauppgerð

Suðuroyggin eigur tvey umboð í næstbestu deildini í 2011.

FC Suðuroy varðveitti ikki í sæti í Vodafonedeildini. Tað hevur við sær, at Suðuroyggin verður karmur um tríggjar grannauppgerðir í 1. deild.

FC Suðuroy kunngjørdi í november, at tvørámaðurin Poul F. Joensen skal standa á odda fyri liðnum.

Teir vóru báðir á liðnum hjá TB, sum vann føroyameistaraheitið í 1987.

Tvøroyri hevur uppalt venjararnar hjá TB og FC Suðuroy.

Landskappingardystirnir millum liðini verða serstakir, væntar Jón Johannesen.

- Eg havi spælt nógv saman við Poul F. Joensen hjá TB. Tað, at vit skulu kappast næsta ár, hugsi eg ikki stórvegis um. Okkara vinskapur broytist ikki, sigur Jón Johannesen og vísir á, at tað eru bara tríggir dystir av 27 landskappingardystum, at teir skulu royna at vinna á hvørjum øðrum.

### Skulu flyta upp

Jón Johannesen letur ongan iva verða um, at TB skal flyta upp.

Venjarin heldur, at hópurin er spennandi og evnaríkur.

Tað sigur hann við heimasíðuna hjá TB.

- Vit hava eina góða blanding av royndum og ungum leikarum. Teir leikararnir, eg arbeiddi við í ár, eru betri samanspældir nú. Umframt tað, fáa vit nýtt og sera spennandi ískoyti úr ungdómsdeildini, og onkur av teimum fær væntandi sítt gjøgnumbrot longu í 2011, sigur hann.

Uppflyting er eitt ítøkiligt mál at seta sær, heldur hann.




# Vónbrotin landsliðs-venjari

Tað varð ikki vænta, at norsku kvinnurnar fekk trupulleikar í dystinum móti Svøríki í gjár.

Noregi var hinvegin lítið sannførandi og tapti 19-24. Fyri fyrstu ferð í fimm ár hava kvinnurnar úr Noregi skotið færri enn 20 mál í einum dysti.

Thorir Hegeirsson er landsliðsvenjari.

- Vit royndu fleiri nýggj mynstur í verjuni og álopinum. Tað er ein feril av vónloysi nú. Men tað skal tað vera í einum meistaraskapi. Tú er í viðráki og mótráki allatíð, sigur hann við VG.

Noregi og Danmark eru vertur fyri kappingini hesaferð. Norsku kvinnurnar hava spælt allar sínar dystir í Lillehammer.

Hegeirsson heldur ikki, at dómararnir røktu sína skyldu hesaferð.

- Tað er hinvegin ov lætt at siga, at dómararnir høvdu ábyrgdina. Okkara avrik hevði við sær, at Svøríki spældi væl, sigur hann.

Úrslitini hevur við sær, at Noregi er í vanda fyri ikki at spæla seg víðari.